## Stórur føroyskur og grønlendskur áhugi fyri sjóverjuni



Ta› vóru serliga teir ungu grønlendingarnir, sum vístu stóran áhuga fyri einari møguligari framtí› í sjóverjuni, men føroyingar vóru ikki heilt sørir kortini. Átøkini, sum danska sjóverjan skipa›i fyri í Føroyum og í Grønlandi fyri kortum, fingu størri undirtøku enn vænta›. Ta› sigur talskvinnan hjá flotastø›ini í Frederikshavn, Maria Martens, vi› Nordjyske Medier. Sjóverjan sendi skipini Triton og Hvidbjørnen á kunningarfer› kring Føroyar og Grønland. Í Føroyum komu 528 ungfólk umbor› at hyggja seg um og at spyrja seg fyri, og í Grønlandi vóru ikki færri enn 1.070 ungdómar umbor› og fregna›ust, sigur Maria Martens. Í heyst fer sjóverjan at skipa fyri at taka lut í útbúgvingartiltøkum í Grønlandi og í Føroyum.

# Flesjuóhapp viðgjørt longu í februar



*Oljusperringarnar, sum Tórshavnar Kommuna legði út við Hvítanes, róku á land longu týsmorgunin og lógu har enn seint á kvøldi. Á felagsráðstevnu um tilbúgving í februar í ár, var júst spurningurin um á ábyrgd og mannagongdir hjá kommunum í sambandi við oljudálking havdur á lofti*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Minni enn eitt hálvt ár fyri óhappið við russiska trolaranum Olshana, skipaði Tilbúgvingarstovnurin fyri ráðstevnu við 220 luttakurum um júst teir trupuleikar, sum nú hava stungið seg upp**

OLSHANA
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Í februar í ár vóru 220 fólk umboðandi lands- og kommunalpolitikkarar, embætisfólk, brunaumsjónarmenn, sløkkiliðsfólk, bjargingarfólk, ambulansufólk og nógv onnur, ið arbeiða við tilbúgving á ráðstevnu um tilbúgving á Hotel Føroyum.

Fyrilestrar vóru við serkønum fólki úr Skotlandi, Íslandi og Noregi um eitt nú oljudálking og tørvin á samstarvið millum kommunurnar. Harumframt varð skipað fyri einari borðvenjing, har luttakarnir skuldu ímynda sær, at eitt ferðamannaskip siglir á Flesjarnar.

Luttararnir skuldu so taka støðu til, hvussu bjargingararbeiðið skuldi raðfestast, hvussu ábyrgdin skuldi býtast millum reiðarí, land og kommunur, hvussu oljudálking skuldi handfarast, og hvør hevði ábyrgdina av hesum.

Áðrenn ráðstevnan endaði var atkvøtt um, hvørji mál luttakarnir mettu hava størst týdning at fáa loyst. Hægstu raðfestinging fekk ein felags tilbúgvingarleistur, meðan samskipan yvir kommunumørk var á triðja plássi.

Málsøkið tilbúgving varð yvirtikið 1. januar í ár, og ráðstevnan um tilbúgving var fyrsta tiltak av sínum slagi, eftir at málsøkið varð yvirtikið. Ein avleiðing av yvirtøkuni var, at ábyrgdarbýtið millum landsstýrismann, kommunur og fyritøkur varð staðfest í føroyskari lóggávu. Tí vóru umboð fyri allar viðkomandi myndugleikar og stovnar við á ráðstevnuni.

### Felags leist og kommunusamstarv

Felags tilbúgvingarleistur var tað evnið, sum teir 220 luttakarnir mettu hava stórst týdning, og Tilbúgvingarstovnurin átók sær ábyrgd av at samskipa arbeiði at gera ein felags tilbúgvingarleist, sum kann brúkast sum standard hjá myndugleikum, stovnum og øðrum, sum hava tilbúgvingarábyrgd

Seinast í mars mánað var so ein fundur um felags tilbúgvingarleist hildin á Hotel Hafnia, har umboð fyri 26 avvarandi stovnar og feløg vórðu boðin við.

Fleiri aðrir uppfylgjandi fundir hava eisini verið, har einstøk ítøkulig mál hava verið viðgjørd.

Inni á heimasíðuna hjá MRCC ber til at fylgja við í fundarvirkseminum. Millum annað hevur Føroya Kommunufelag átikið sær partin »Samskipan yvir kommunumørk«.

### Norskar royndir

Ein av fyrilestrahaldarunum á stóru ráðstevnuni var Ove Njøten frá Norsk beredskap mot akkut forurensing. Hann greiddi frá um tá tangaskipið MV Server rendi á land í Noreg 12. Januar í ár. Hetta skipið hevði á leið 590 tons tungolju umborð, og av hesum vóru 350 tons likin úr skipinum. Bjargingararbeiðið var bæði umfatandi og kostnaðarmikið. Tann 20. Januar vóru tildømis framvegis 110 persónar og 26 skip við í arbeiðinum.

Eftir tað norska óhappið vóru 1400 tíðindaskriv send út. Og føroyska ráðstevnan viðgjørdi eisini samskiftið við fjølmiðlarnar, og hvussu ágangandi miðlafólk skulu handfarast.

Eftir ráðstevnuna vóru luttakarnir bidnir at eftirmeta fyrimunir og vansar við ráðstevnuni. Flestu luttakar fegnaðust um høvi at hittast og samskifta. Men sum ein av luttakarunum tók til:

- Nógv mál verða lýst uppá stutta tíð - gevur gott yvirlit - eisini yvir, hvussu illa stendur til.

## Fuglur innsmurdur í olju



Tað verða óiva fleiri fólk, ið fara at spyrja, hvat tey skulu gera, tá tey finna ein fugl, ið hevur verið í oljuni, sum rann úr skipinum, ið sakk við flesjarnar. Tann, ið spyr vil gjarna hjálpa fuglinum, tí kanska er fuglurin ikki so illa fyri, at hann absolut skal kippast. Aðrastaðni redda tey nógvar fuglar, ið eru innsmurdir í olju, enntá tjúkka svarta olju, og tað kunnu okkara djóravinir eisini gera.

Um tú vilt redda fugl, sum hevur fingið olju uppá seg, skalt tú gera soleiðis:

Tvey fólk mugu vera um tað.

Koyr fyrst reint hondheitt vatn í vaskið ella í eina balju.

Koyr uppvaskisápu í hondina á tær og gnýggja sápuna í fjarðarnar á fuglinum sama veg sum fjarðarnar venda, als ikki imóti fjarðunum.

Lat sápuna vera í eina lítla løtu, meðan hon virkar.

Koyr fuglin í tað heita vatnið og skola forsiktiga sápuna úr við hondini, sum um tú kelar fuglinum.

Skola eftir ella brúsa við reinum heitum vatnið til øll sápan er farin úr.

Lat fuglin torna.

Innvendiga skal fuglurin eisini reinsast, og tað gert tú við at geva honum aktivt kol (fæst á apotekinum) í eina einnýtissproytu tvær ferðir um dagin í tveir dagar. Aktivt kol verður annars nýtt, tá fólk hava drukkið okkurt giftigt, tí tað trekkir giftina til sín.

**Djóraverndarfelagið**